# Dóttirfelag hjá Eik lænir 300 milliónir úr Bankapakka II

Dótturfelagið hjá Eik Banka í Danmark hevur fingið tilsøgn um slakar 300 milliónir krónur úr Bankapakka II. Hetta styrkir um kapitalgrundarlagið og solvensin hjá Eik-samtakinum. Lánið er á 295,3 milliónir krónur, harav 27,5 milliónir kunnu umleggjast til partapening. Lánið verður upptikið 30. juni 2009 við eini effektivari rentu á 11,5 prosent. Forstjórin í Eik Banka fegnast um lánið hjá dótturbankanum. - Vit eru nøgd við, at kapitalgrundarlagið í samtakinum er styrkt, tí tað gevur tryggleika og økir vakstrarmøguleikarnar, sigur Marner Jacobsen, forstjóri í Eik Banka. Solvensurin hjá Eik Bank Danmark styrkist og verður væntandi 16,4 prosent tann 30. juni. Kjarnukapitalurin er 12,3 prosent. Fyri samtakið merkir lántøkan, at solvensurin uppgjørdur fyri 1. ársfjórðing styrkist við 1,8 prosentstigum upp í 11,8 prosent, sum er 3,8 prosent omanfyri lógarkravdu 8 prosentini. Til sammetingar kann nevnast at Føroya Banki hevur ein solvens á 20,8 prosent.




# Fríksúlar gera mun á børnum

**Eyðun Joensen, sálarfrøðingur, er bangin fyri, at ymisku fríkúlarnir, sum stinga seg upp, kunnu skapa eliterar tilstandir í samfelagnum. – Mær hóvar illa, tá tey vaksnu í sjálvdrátti fonglast við skúlar fyri gudiligar ella stættarligar elitur**

FRÍSKÚLI
*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*



*Eyðun Joensen, sálafrøðingur, ber ótta fyri, at fríkúlarnir kunnu skapa ójavnar, og tí vera við til, at býta fólkini í landinum sundur*

Sambært Eyðuni Joensen, sálarfrøðingi, eru bæði fyrimunir og vansar við at skipa fríkúlar kring landið. Teir kunnu vera øgiliga vandamiklir, tí hetta kann skapa snævurskygni og eliterar tilstandir. men fakligu avbjóðingarnar kunnu gerast rættiliga góðar, umframt at hann heldur at onkrir serligir vandar eru við skúlanum í Kelduni, hóast hann ikki ivast í, at nógv gott kann spyrjast burturúr.

- Nunnuskúlin var í mong á fríkúli og seinni kom Adventistaskúlin, umframt annan fríkúla, sum rigga væl uttan trupulleikar við almenna lóggávu. Og sum er síggi ætlanirnar úr Kelduni, um skúla í teirra samkomuhølum. So er fleiri, sum helst koma at arbeiða í skúlanum, longu virkin í fólkaskúlanum og hava fleiri góð hugskot, so eg rokni ikki við, at tey koma upp á tvørs av almennu myndugleikunum, sigur Eyðun Joensen.

- Fakliga kunnu fríkúlar væl vera ein hent avbjóðing fyri almenna fólkaskúlan, síðani lærarar jú hava metodufrælsi. Men betri hevði mær dámað, um nýframbrotini fóru fram innan fólkaskúlans karmar, og dugi eg ikki har at síggja nakrar forðingar fyri tí, staðfestir hann.

## Fólkaskúlan besta loysnin

Út frá einum fakligum sjónarhorni, metir Eyðun Joensen, at fríkúlarnir kunnu standa øgiliga sterkir fakliga, men hann er veruliga bangin fyri menniskjansligu fylgjunum.

- Sjálvur havi eg í ungdómsins blóma royn ein gudiligan studentafríkúla, har foreldur kundu keypa seg inn vegna sítt syndafulla avkom. Well, fakliga skarst bara væl, men annars vóru tað 3 ár í sosialari og menniskjuligari niðurbinding, sigur hann.

Og leggur afturat, at fólkaskúlin er samfelagsins og okkara veruliga samhaldsfasta amboð til tess at fyrireika uppvaksandi ættarlið til frægast gjørligt at møta síni samtíð í øllum síni fjølbroytni og harvið møta og samvirka við øllum komandi samfelagsborgarum, metir sálarfrøðingurin, og staðfestir, at fólkaskúlin í veruleikanum er einasta kravda lívsskeið okkara, har vit øll tvørs av øllum mørkum kunnu vera saman og kunnu læra at vera saman, læra tolsemi, sína millum virðing og samljóð undir skipaðum umstøðum.

## Keldan ongan einkarætt

Eyðun Joensen hevur somuleiðis ilt við at skilja, at Keldan skal gera tað til sítt egna at skapa tolsemi, dugnaskap og allar aðrar fyritreytir, sum flestu okkara síggja sum dygdir.

- Fólkaskúlin er ikki bara fyri øll, men er eisini djúpt forankraður í kristnari lívsáskoðan, so eg ivist í, um hasi væl saktans so »bókstavatrúgvu« Keldufólkini hava tráðlisið endamálsorðing fólkaskúlans nóg væl, síðani so mangar av teirra góðu visjónum longu eru niður feldar í verandi fólkaskúlalóg, sigur Eyðun Joensen.

Tó leggur hann dent á, at børn í Føroyum hava skyldu at lata seg undirvísa í 9 ár, men hava sum so ikki skyldu at ganga í almenna fólkaskúlan.

## Ongin annar torir

Hóast Eyðun Joensen ikki ræðist skúlan í Kelduni so illa, sum nógv onnur kanska gera, so er hann sannførdur um, at tað finst onkur orsøk til at til dømis brøðrasamkoman ongantíð hevur skipað egnan skúla.

- Tað er ein styrki og tekin um andaligt kjølfesti, tá fólk við so ymiskum sjónarmiðum hóast alt standa saman við øðrum um felags níggju ára skúla fyri síni børn, sigur hann, og vísir á, at tað er besta loysnin, at børn koma saman við ymiskum børnum og ikki bara teimum við eini ávísari tankagongd.



*Katrin Dahl Jacobsen metir, at tað hevði verið nógv betri at styrkja fólkaskúlan enn at fokusera so nógv upp á fríkúlar*
*Mynd: Sonja I. Jacobsen*

## Hetta var vandin

**Katrin Dahl Jacobsen, tingkvinna, sum sat í mentanarnevndini hjá tinginum, tá fríkúlalógin kom, greiðir frá, at skúlar sum tann, ið tey í Kelduni ætla at skipa, eru ein partur av vandanum við at hava fríkúlar.**

**- Eg eri av tí sannføring, at tað eigur at bera til at hava ein góðan skúla fyri øll. Tí eigur fólkaskúlin at vera sterkur. Hinvegin kann mann ikki nokta fólki at nýta sín pening, sum tey vilja. Men veruligi vandin er tá seráhugamál eru við til at diffirentiera í samfelagnum, sigur tingkvinnan.**

**Hon vísir somuleiðis á, at fólkaskúlin er eitt av tí, sum heldur samfelagnum saman, tí har eru øll børn saman, og tað er ein vandamikil leið, tá stættarligir ella aðrir munir verða gjørdir á børnum í einum samfelagi, sum er eins lítið og okkara.**

**Hin vegin staðfestir hon eisini, at ein og hvør fríkúli skal góðkennast sambært lógini, og tí kann mann kenna seg rímiliga tryggan.**

**- Men tað týdningarmesta er, at vit nýta orku til at styrkja fólkaskúlan, so vit ikki verða splittað í ymisk sløg av borgarum, sigur hon.**